# Ungur listamaður á Norðoya Kunningarstovu

Hanus Lind Sørensen úr Hvannasundi, hevur hetta fram til jóla framsýning á Norðoya Kunningarstovu

Hanus sum er 28 ára gamal hevur frá smádrongi av havt góðan hug at tekna. Í 2001 fór hann á kvøldskúla hjá listamanninum Archibald Black á læra at mála, og gekk hann har í 3 vetrar.

Framsýningin á Norðoya Kunningarstovu er fyrsta sjálvstøðuga framsýningin hjá evnaríka listamanninum. Hann var við á stóru framsýningini hjá Norðoya Sparikassa og eisini nakrar ferðir á markanaðardegnum á Fossanesi.

Allar myndirnar eru akrylmálningar.

**ave**



*Hetta til jóla sýnir listamaðurin Hanus L. Sørensen fram akrylmálingar í Norðoya Kunningarstovu*

# Nýtt blað á gøtuni

**Fríggjadagin kom nýggja blaðið Kjølurin fyrstu ferð á gøtuna. Blaðið fevnir breitt við íkastum frá høvundum, serfrøðingum umframt fleiri kendum nøvnum úr føroyska blaðheiminum**

**NÝTT BLAÐ**

Hetta fyrsta eintakið av Kjølinum røkkur víða, og uttan iva finna flestu lesarar okkurt av júst teirra áhuga. Í blaðnum hesuferð er m.a portrett av tíðindakvinnuni Beintu Løwe Jacobsen, prát við pólska fótbóltsvenjaran Piotr Krakowski, grein um vetrartyngd, lesitilfar til familjuna, siðsøguligar greinar, mentan, ítróttur umframt spurningar til fólk á gøtuni.

Kjølurin er snotiliga uppsettur við hópin av góðum myndum.

Fyrstu tíðina kemur blaðið út aðru hvørja viku, men sum frá líður er ætlanin, at Kjølurin verður eitt vikublað.

Tað eru teir báðir klaksvíkingarnir Rógvi L. Svøðstein og Bárður Lydersen, sum geva Kjølin út.

**ave**


Stór og smá á somu stovu
síða 10-11
Pólski fótbóltsvenjarin Piotr Krakowski
síða 18-19
KJØLURIN
CHRISTIAN Í GRÓTINUM
Við babba til skips
Hóast tiggju ára gamla Rakul er sera heimkær og leingist illa, so helt

# Café á Fornminnissavninum á Tvøroyri

**Hesa vikuna eru holukøkur, vaflur, kaffi og annað at fáa á Fornminnissavninum á Tvøroyri**

**JÓL**

*dagfinn@sosialurin.fo*

Hesa vikuna, fram til og við hósdegnum, er café í hugnaligu húsunum miðskeiðis á Tvøroyri, har Fornminnissavnið á Tvøroyri heldur til.

Har fæst mandlurís, holukøkur, vaflur, gløgg, kaffi og kakao til keyps frá klokkan 17 til 22.

Tað er 2. flokkur í Miðnámsskúlanum, ið skipar fyri. Flokkurin hevur ætlanir um eina námsferð og hetta er ein liður í royndunum at savna pening. Júst hvar flokkurin ætlar sær á námsferð er ikki avgjørt, men eittnú Italia er frammaliga í huganum.

# Sjóborg fann løðing úr enskari minu

Av Færøernes Kommando siga tey frá, at minørtænastan varð boðsend til Leirvíkar hósdagin, tí Sjóborg hevði sett part av eini enskari minu av slagnum MK 17 á land.

Talan var um eina løðing. Hetta er eitt slag av tunnu líknandi luti, ið er inni í minuhúsanum. Løðingar eru formstoypt TNT, ið vigar millum 100 og 245 kg, alt eftir hvat slag av minu talan er um.

Minørtænastan kannaði løðingina og sá at tendriløðingin manglaði, og metti tað tí at vera trygt at flyta løðingina í Mjørkadal, har hon verður goymd, inntil hon verður sprongd seinni.

**nud**


Havnar Bio

kall Coca-Cola




King Kong

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mánadag | 19.12 | kl. 18.00 | kl. 21.45 |
| Týsdag | 20.12 | kl. 18.00 | kl. 21.45 |
| Mikudag | 21.12 | kl. 18.00 | kl. 21.45 |
| Hósdag | 22.12 | kl. 18.00 | kl. 21.45 |
| Fríggjadag | 23.12 | kl. 18.00 | kl. 21.45 |




Just like Heaven

| | | |
|---|---|---|
| Mánadag | 19.12 | kl. 22.15 |
| Týsdag | 20.12 | kl. 22.15 |
| Mikudag | 21.12 | kl. 22.15 |
| Hósdag | 22.12 | kl. 22.15 |
| Fríggjadag | 23.12 | kl. 22.15 |




I dine sko

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mánadag | 19.12 | kl. 19.30 | |
| Týsdag | 20.12 | kl. 19.30 | |
| Mikudag | 21.12 | kl. 19.30 | |
| Hósdag | 22.12 | kl. 19.30 | |
| Fríggjadag | 23.12 | kl. 19.30 | *Seinasta sýning* |




Peddersen og Findus - Nissemaskinen

| | | |
|---|---|---|
| Mánadag | 19.12 | kl. 17.30 |
| Týsdag | 20.12 | kl. 17.30 |
| Mikudag | 21.12 | kl. 17.30 |
| Hósdag | 22.12 | kl. 17.30 |
| Fríggjadag | 23.12 | kl. 17.30 |

KOMANDI FILMUR:

*FRUMSÝNING*

Narnia - Løven, Heksen og Garderobeskabet

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mánadag | 26.12 | kl. 16.00 | kl. 19.00 |

www.bio.fo • Telefon 31 19 56

Stórt úrval av DVD-filmum til sølu